UTTAN ÚR HEIMI

# Noktar teimum neyð-støddu hjálp og verju

**Tey neyðstødddu og svøltandi flóttafólkini í Darfur fáa ikki hjálp, tí sudanski forsetin sigur nei**

DARFUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Omar al-Bashir, forseti, hóttir við at gera av við ST-hermenn, koma teir til Darfur uttan hansara loyvi*

*Mynd: Reuters*

Afrikanski Eindarfelagsskapurin AU hevur biðið altjóða samfelagið senda eina friðarvarðveitandi herdeild til sudanska landspartin Darfur. AU hevur 6.800 hermenn í økinum, men teir megna ikki at verja sivilfólkið ímóti ágangi. Tvørturímóti eru vápnað lið farin at gera seg inn á hermenninar hjá AU, sum tí hevur vent sær til ST um hjálp.

Men sudanski forsetin, Omar al-Bashir, hevur svorið at beina fyri ST-hermonnunum, koma teir hagar uttan loyvi frá stjórn hansara.

– Darfur verður ein kirkjugarður hjá teimum fremmandu ST-hermonnunum, sigur forsetin við fronsku tíðindastovuna AFP. Hann leggur afturat, at hava hermenninir hjá Afrikanska Eindarfelagsskapinum hug at fara til hús, kunnu teir bara stinga í sekkin.

ST hevur skotið upp at senda 14.000 hermenn til Darfur at verja sivilfólkið, sum eru vorðin offur í stríðnum ímillum uppreistrarmenn og sudanska stjórnarherin.

**Eisini í Tjad**

Altjóða hjálparfelagsskaprirnir siga, at sannur ruðuleiki valdar í Darfur. Fleiri vápnað stríðast ímóti hvør øðrum, uttan at tað ber til at siga, hvat tey stríðast um. Antonio Guterres, flóttafólkakommiserur hjá ST, segði í síðstu viku, at kreppan í Darfur er tann ringasta av sínum slagi í heiminum, og at støðan versnar í hvørjum.

Í seinastuni eru vápnað lið eisini farin at gera seg inn á flóttafólkini, sum eru flýdd úr Darfur, og sum halda til í legum í grannalandinum Tjad. Hildið verður, at umleið 200.000 flóttafólk hava verið í legunum har, men nú tey eisini verða álopin har, hava umleið 10.000 valt at venda aftur til Darfur. Men tað er sum at fara úr øskuni í eldin, skrivar AFP.

Eingin veit við vissu, hvussu mong fólk hava latið lív í ófriðinum í Darfur, men ST sigur, at talan er um mong túsund. Harafturat eru meiri enn tvær milliónir fólk rikin frá húsi og heimi, og mong teirra líða hungur.

## Segði sína meining

Bretska forsætisráðharrafrúan, Cherie Blair, legði ikki fingrarnar ímillum, tá hon fyrradagin helt røðu á tí kenda uttanríkispolitiska stovninum Chatham House í London.

Hóast hon ikki nevndi fangaleguna í Guantanamo, vóru áhoyrararnir ikki í iva um, hvat hon hugsaði um, tá hon segði, at fólkarætturin bannar londum at pína fangar, og at tað finnast eingi undantøk frá teirri regluni, heldur ikki í krígstíð.

Maður hennara, Tony Blair, hevur eisini hert orðalagið um fangaleguna í Guantanamo í seinastuni. Í einari røðu í Undirhúsinum mikudagin segði hann seg vóna, at fangarnir koma fyri ein dómstól skjótt, so teir annaðhvørt verða dømdir ella fríkendir, og soleiðis at fangalegan kann niðurleggjast.



*Tony Blair og konan herða orðalagið um fangaleguna í Guantanamo.*

## Bleiv noyddur frá

Bajram Kosumi, sum hevur verið forsætisráðharri í Kosovo hetta seinasta árið, hevur rættiliga óvæntað lagt frá sær eftir innanhýsis ósemju í stjórnarflokkinum.

Politiskir eygleiðarar vænta, at Agim Ceku fer at taka við eftir Kosumi. Ceku var uppreistrarleiðari og stóð á odda fyri bardagunum ímóti serbiska herinum undir borgarakrígnum fyri sjey árum síðani. Hann er yvirhøvurr væl umtóktur í Kosovo og verður roknaður sum ein nýskipanarpolitikari. Hinvegin halda serbar lítið um hann, og teir hava eisini boðað frá, at Agim Ceku er ikki egnaður til at leiða eitt samfelag, har serbar eisini búgva.

Í hesum døgum eru samráðingar um framtíðina hjá Kosovo, og tær skulu ætlandi enda í hesum árinum. Tann albanski meirilutin vil hava fult sjálvsstýri, men tann serbiski minnilutin sigur seg ikki hava álit á einum albanskum stýri og vil hava altjóða verju ímóti meirilutanum.

Formliga er Kosovo framvegis ein partur av Serbia Montenegro, men undir ST-umsiting.

## – Vit fáa hann!

George W. Bush, forseti, var í Afghanistan mikudagin, har hann nýtti høvi til at vitja nakrar av teimum 20.000 hermonnunum, sum USA hevur í landinum.

Aftan á vitjanina hjá hermonnunum hildu Bush og afghanski forsetin, Hamid Kaezai, felags tíðindafund, og har bleiv Bush spurdur, um og nær USA fer at taka yvirgangsleiðaran Osama bin Laden.

– Vit fáa hann. Spurningurin er ikki, um hann og hansara hjálparmenn verða tiknir, men heldur nær tað verður, svaraði Bush. Hann legði afturat, at bardagin ímóti al-Qaeda gongur tann rætta vegin, og at tað eisini fer at eydnast at finna og taka leiðararnar.

Seinastu tíðina er mótstøðan ímóti teimum amerikonsku hermonnunum í Afghanistan vaksin, og afghanskir myndugleikar siga, at tað eru viðhaldsmenn hjá gamla Talibanstýrinum, sum skipa fyri. Afghanska stjórnin vil vera við, at fleiri sjálvmorðsbumbumenn eru komnir um markið úr Pakistan, og á tíðindafundinum lovaði Bush at taka málið upp við pakistanska forsetan, Perves Musharaf, tá teir báðir ætlandi hittast í morgin.

# Vilja hava palestinskan film úr Oscar-kappingini

**32.000 ísraelsmenn hava skrivað undir eitt krav um, at ein palestinskur filmur skal útihýsast frá Oscar-kappingini**

FILMUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Avvarðandi hjá nøkrum ísraelsmonnum, sum eru deyðir í palestinskum atsóknum, krevja, at palestinski filmurin ”Paradise Now” verður tikin burtur úr teirri árligu Oscar-kappingini, sum verður sunnudagin. Filmurin er annars innstillaður til kappingina sum besti útlendski filmur.

Tey avvarðandi í Ísrael vilja vera við, at filmurin ger sjálvmorðsbumbumenn til halgimenni, og at hyggjararnir fáa ta fatan, at ísraelska framferðin gevur ikki palestinum annað í at velja enn sjálvmorðsatsóknir. Tey siga seg eisini stúra fyri, at filmurin kann eggja til yvirgang.

Avvarðandi hjá 17 ísraelsmonnum, sum doyðu í einari sjálvmorðsatsókn í Haifa fyri trimum árum síðani, hava tikið stig til mótmælið. 124 sjálvmorðsatsóknir hava verið síðani 2000, og tær hava kostað 521 ísraelsmonnum lívið, skrivar AP.

## Ódnarveður í Grønlandi

Tað hevur verið av ringasta veðri summastaðni í Grønlandi teir seinastu dagarnar, og á donsku flotastøðini Grønnedal hava teir mátað vindferð upp í 62 metrar um sekundið, sigur TV2. Telefonsambandið hjá flotastøðini fór, og fleiri bilar fingu skaða av smágróti, sum kom flúgvandi við teimum hørðu hvirlunum.

Í Vestur- og Suðurgrønlandi hava tey harafturímóti havt summarveður við ímillum 12 og 15 hitastigum.